# Miðvikan

Framhald frá síðu 17

**23. mars 1931**
Uppboð var hildið og vardi í 6 tímar. Tá ið uppboðið var liðugt, varð ikki hildið vakt meira á strandstaðnum. Kunngjørt varð, at tilboð uppá skipið, sum tað lá, kundi sendast til hreppstjóran. Skipsskrokkurin (vrakið) broyttist lítið.

**27. mars 1931**
Telegramm frá løgreglustjóranum um útbjóðingina av skipsskrokkinum við tí, sum er í honum, og í tí standi, sum hann verður í við søluna, var kunngjørt í kommununi og grannakommununum.

*Eyjólfur Eyjólfsson, hreppstjóri*
*Bjarnfreður Jóh. Ingimundarson,*
*Guðmundur Bjarnasson*

### Viðmerking:

Nevnast skal, at hreppstjórin var tann maðurin, sum umboðaði sýslumannin ella løgreglustjóran og sum ein kommuna valdi (oftast aðrastaðni frá) til at vera yvirleiðari fyri kommununa í øðrum málum enn teimum, sum snúgvu seg um tann dagliga raksturin í bygdini/bygdunum. Hvør sýsla hevði ein sýslumann, meðan hvør kommuna hevði ein hreppstjóra.

## Finnleif:
## Á staðnum í 2002

Eftir at eg hevði skrivað hesa frásøgn í 1991, hugsaði eg, at áhugavert hevði verið at farið á staðið, har teir strandaðu. Í mínum starvi hjá Landsverk eri eg komin av og á til Íslands í sambandi við norðurlendskar fundir og ráðstevnur. Eisini havi eg gjøgnum árini havt eitt gott samstarv við Íslendska vegaverkið. Í august 2002 var ársfundurin í Nordisk Chefforum hildin í Reykjavík. Hetta eru fundir, har leiðslan í teim norðurlendsku vegaverkunum møtast einaferð um árið. Síðani í 1983 havi eg umboðað Landsverk á hesum fundum.

Tá ið hesir fundirnir vóru lidnir, bjóðaði Gudmundur Arason, yvirverkfrøðingur í íslendska vegaverkinum, og sum eg havi kent í mong ár, mær ein túr til Kirkjubæjarklaustur. Eg man helst hava sagt Gudmundi onkuntíð frá hesi hending, tá ið pápin strandaði í Meðallandsvíkini. Hetta takkaði eg fyri. Vit fóru úr Reykjavík við bili seinrapart á degi og koyrdu til bygdina Vík, har vit yvirnáttaðu. Morgunin eftir koyrdu vit til vegastøðina í Vík, har Gylfi Juliusson, økisverkfrøðingur á Suðurlandinum, tók í móti.

Tá ið vit høvdu fingið okkum ein góðan bita og vóru vístir runt á vegastøðini, koyrdu vit tríggir í einum 4-hjólstrektum jeepi ímóti bygdini Kirkjubæjarklaustur. Komnir til Kúðarfljót, koyrdu vit av høvuðsvegnum eftir einum bygdarvegi til ein bóndagarð í Bakkaskoti, ið liggur nakað sunnan fyri Kirkjubæjarklaustur. Guðni Runolfsson, bóndi, ið var staðkendur, kom við okkum og koyrdu vit fýra síðani oman á staðið á Ovaru-Steinmýrafjøru, har "Queen Victoria" strandaði. Meðallandssandurin er ein umleið 50 km long sandstrond. Har er útgrunt, og mong skip eru komin illani fyri har.

Nevnast kann, at á Suðurlandinum - millum Dyrhólaey og Ingólfshøfði - har strandalongdin er umleið 140 km, strandaðu í tíðarskeiðinum 1892 – 1982 105 skip, har tey flestu gjørdust vrak. Nevnast kann, at av hesum skipum vóru 37 bretskir trolarar, 27 týskir trolarar, 12 íslendsk skip, 11 fronsk skip, 8 føroysk skip, 5 norsk, 3 belgiskir trolarar og 2 donsk skip.

Aftaná at hava hugt at staðnum og kunnað okkum um umstøðurnar og tikið nakrar myndir, koyrdu vit eftir sandinum til Skaftarósan, har John á Bakkanum svam yvirum við manni á bakinum.

Guðni, ið var sera blíður og tíðindafróður, greiddi frá umstøðunum har á leið.

Meðan vit koyrdu eftir sandstrondini, steðgaðu vit á við eitt sokallað "neyðarskýli", sum er/var ætlað strandaðum sjómonnum at bjarga sær í. Millum Vík og Ingolfshøfði eru 12 neyðarskýlir, sum eru bygd framvið sjóarmálanum. Fráleikin millum hesi neyðarskýlini er 15 til 40 km.

Guðni segði m.a., at áðrenn vegakerviðá Suðurlandinum millum Reykjavík og Kirkubæjarklaustur varð bundið saman í 1942, vóru trý felags handilshús (Keypfelagshús) á Suðurlandinum. Eitt í bygdini Vík, eitt við Skaftarósan og eitt í Høfn. Hetta vóru felags vørugoymsluhús hjá handilsmonnum á Suðurlandinum, ið stóðu nær við sjóarmálan. Vøran varð flutt sjóvegis úr Reykjavík ella úr Vestmannaoyggjunum.

Hetta húsið við Skaftarósa, sum strandaðu mennirnir komu inn í , var eitt stórt hús í 3 hæddum, bygt úr timbri. Húsið varð tikið niður í 1942, eftir at vegasamband var komið, og bygt uppaftur við Kirkjubæjarklaustur sum ein seglbúð.

Tá ið vit stóðu við Skaftarósa og eg greiddi teimum frá, at John á Bakkanum hevði svomið tvørtur um ósan við manni á bakinum, hildu teir, at hetta var eitt satt mandómsbragd. Teir høvdu ikki hoyrt um nakran annan, ið hevði gjørt hetta, tí streymurin er so harður oman gjøgnum áarósan.

Frá Skaftarósa koyrdu vit niðan í bygdina Kirkjubæjarklaustur, ið liggur uml. 25 km niðan frá strondini. Vit steðgaðu við bæði húsini, sum tóku ímóti manningini av "Queen Victoriu". Haðani koyrdu vit heim á bóndagarðin hjá Guðna, har bóndakonan og dóttirin høvdu gjørt okkum ein sera góðan døgurða, lambasteik við øllum góðum afturvið og omaná. Á bóndagarðinum vóru umfram Guðni Runolfsson, ið var føddur í 1938, kona hansara og eisini pápi hansara. Dóttir teirra og sonur hennara vóru komin at vitja foreldrini og abban.

Aftaná at hava takka fyri okkum, koyrdu vit tríggir, Guðmundur, Gylfi og eg eftir høvuðsvegnum eystur móti Skeiðarársandi og hugdu, hvussu teir høvdu loyst tað akuttu støðuna at gera ábøtur á vegin og brúgvar, ið fingu stóran skaða, tá ið eldgos var við Skeiðarárjøkul í 1996, og sum elvdi til vatnflóð og oyðilegði partar av høvuðsvegnum. Tvær stórar brúgvar og 30 km av vegi skoladu burtur.

Haðani gekk leiðin aftur til Reykjavíkar.

Ein spennandi ferð og ein minniligur dagur var komin at enda.

***Keldur:***
Ejvind Winther Durhuus
Siglingarsøga bind IX
Guðni Runolfsson, bóndi, Kirkjubæjarklaustur
Sjófrágreiðing (Tjóðskjalasavn Íslands)
Dynskógar bind 8 (skip strandaði á Suðurlandinum 1898-1982)

*Á páskum 2010*
*Finnleif W. Durhuus*



*Húsini hjá Hávarði Jónssyni, bónda í Kirkjubœarkleystur, har Ejvind saman við øðrum av manningini búði í fýra dagar*



*Bóndagarðurin á Hólmi, har restin av manningini búði*




*Kort av parti av Meðalandsvíkini, sum er umrødd í frásøgnini*

**Myndirnar vóru frá Fornminnissavninum**
Í seinasta parti høvdu vit tvær frálíkar myndir av mannningunum á John Bull og Skálanesi. Av misgávum var ikki tilskilað at myndirnar eru frá Føroya Fornminnissavn.

---

**Komandi partur**
Í komandi parti verður greitt meira frá ættini hjá John á Bakkanum. Um nakar veit nakað meira um hesa hending ella hevur mynd av Queen Victoriu vilja vit fegin frætta. Komið verður eisini aftur til brøðurnar Tummas og Viggo Zachariassen. Júst fyri 50 árum síðani gekk bróðursonur teirra, uppkallaður eftir teimum báðum, burtur á Kappanum við Hanne S.